## Fritzl hevði eisini fanga á loftinum

Josef Fritzl, ið hevði dóttir sína í kjallaranum í nógv ár, stongdi eisini mammu sína inni. Mamman var nevniliga innistongd á loftinum tað seinasta árið av lívið hennara. Fritzl hevur greitt einum psykologi frá, at hann stongdi mammu sína inni, tí hon hevði sligið hann, tá hann var barn. - Eg fekk ongantíð nakra umsorgan frá mammu míni, hon plagdi at buka meg, til eg lá á gólvinum í einum hyli av blóið, hevur Josef Fritzl sagt, sambært the Sun. Mamman doyði í 1980, eftir at hava verið innistongd í eitt ár. Sonurin syrgdi eisini fyri, at hon onki sólarljós fekk. Hann hevur eisini sagt, at hann sá dóttir sína, sum um tað var kona hansara.Í kanningum er siðamisbrotsmaðurin sagdur at vera frískur, so hann verður helst innistongdur restina av lívinum.



# Teitur sendur í geglið

**Føroyski sangfuglurin málaði fyri tíð síðani Jógvan Sundstein á Berlinmúrin. Undir tekningini hevði Teitur Lassen skrivað »loysing«. Fyri hetta slapp hann ein túr í geglið**

ATGERÐ
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Teitur Lassen er ikki vanliga kendur sum nakar brotsmaður, men í Týsklandi varð hann sendur í geglið*

15. oktobur í ár var Teitur Lassen og spældi konsert í Berlin. Eftir konsertina gjørdi hann av at mála eina tekning á Berlinmúrin. Tað er onki óvanligt í, at fólk mála á múrin, og Teitur vildi eisini vera við í hesum, sum so nógv hava gjørt frammanundan honum.

Við Ekstrablaðið, sigur Teitur Lassen, at hann fekk hug at gera eitt lítið innslag, at hann hevur eina fortíð sum teknari, og tí hevði hann hug at gera eitt lítið listaverk.

### Lættur at tekna

Hví Teitur valdi at tekna júst Jógvan Sundstein er ein góður spurningur, og tíverri hevur Teitur ikki verið at røkka áðrenn blaðið fór til prentingar. Men pápi Teit greiðir frá, at sonurin helst málaði hendan frá-farna politikara, tí hann er so léttur at tekna.

Harumframt er ongin loyna, at Teitur Lassen er loysingarsinnaður, og tað er helst tí hann valdi at skrivað loysing undir grafititekningina.

### Slapp í brummuna

Hóast tað er sera nógv grafiti í Berlin, og Teitur ikki er kendur sum nakar búrkroppur – Hann hevur enntá verið á fløguni, songs for Tibet – varð Teitur noyddur at fara ein túr í geglið fyri sítt lítla listaverk. Týska løgreglan tók nevniliga Teit á búri, og tá datt góða lagið kanska burtur, tí tá løgdu týsku løgreglumenninir Teit í hondjørn og drógu 31 ára gamla havnardrongin við á støðina. Har var sangarin noyddur at sita í eina løtu, áðrenn hann slapp at gjalda 400 evrur fyri at sleppa útaftur.

Í samband við illgerðina greiðir Teitur frá, at løgreglan fekk hann at skriva undir eina rúgvu av tingum, umfram at hótta hann við rættarmálið og fongsulsrevsing, men at teir eftir tveimum tímum lótu hann leysan.

### Málar helst ikki Sveits

Í løtuni er Teitur Lassen í Sveits, sum er ein partur av konsertferðini. Hann spældi ein konsert í nátt, og helst er tað tí, at Sosialurin ikki fær fatur á honum. Tó skilst, at Teitur noktar fyri at úttala seg, um hann fer at gera somu skreytir í Sveits, so kanska grafitikúllurin úr Havn lærdi nakað av at verða settur fastur eina løtu.

Í fyrradagin hevði Teitur konsert í Paris, og í gjár í Winthertur í Sveits. Á álmanakkanum hjá Teiti stendur onki um, nær hann kemur at vitja Føroyar aftur, men nakrar konsertir vera í Danmark næsta mánaðin.

# Heðin er ikki ordiligur javnaðarmaður :)

**Undir eini grein á heimasíðuni www.facebook.com leggur Eyðgunn Samuelsen, javnaðartingkvinna, Heðin Mortensen undir, ikki at vera ordiligan javnaðarmann. Facebook hevur í øðrum londum verið brúkt til kjak í longri tíð, og nú er hesin táttur eisini komin til Føroyar**

KJAK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

At júst hetta kjak, har Eyðgunn Samuelsen sigur sína hugsan, er valt, er eitt sindur tilvildarligt, men áhugavert er tað.

- Hatta er sagt í einum løttum tóna. Mann situr á netinum, og tá virkar alt ikki líka álvarligt. Mann skemtast og prikar hvønn annan, og eg setti eisini ein smiley aftanfyri. Men eg haldi tað er ov galið, at Heðin Mortensen ikki gongur inn fyri útjavning, tí tað er grundhugsanin í javnaðarpolitikki. Men mann skal ansa eftir, at mann ikki tekur tað fyri meira enn tað er, sigur Eyðgunn Samuelsen, sum undir eini valgrein um kommunala útjavning skrivaði, at Heðin Mortensen ikki er ein ordiligur javnaðarmaður.

### Vanligt aðrastaðni

Í øðrum londum hevur tað leingi verið vanligt millum politikarar at kjakast á Facebook. Danski forsetisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, er ein av teimum, ið hevur verið raskur til hetta, og nú sær út til, at hetta eisini er komin til Føroyar.

Hóast hetta ikki er eitt so álvarligt kjak, kann væl hugsast, at tað í framtíðini verður alsamt vanligari, at poltikarar veruliga kjakast á netinum. So kanska verður øll viðgerðin av fíggjarlógini fyri 2012 av gjørt á netinum. Livst so spyrst.



*Frá orðaskifti á internetsíðuni, Facebook*